


*Nr. 3* *5. februar 2017* *77. árg.*

# Vit hava ta tíð, vit fáa

Fyri nøkrum vikum síðani fóru vit undir eitt nýtt ár. Eitt ársskifti er eitt upplagt høvi at hugsa eitt sindur eyka um lívið. Hvat nýttu vit farna árið til, og hvørjar ætlanir hava vit fyri nýggja árið.

Tíð er nakað, vit fáa – men ikki í óavmarkaðari nøgd. Men júst nú hava vit hana. Hon kemur til okkara frá honum, sum gevur okkum lívið.

„Eg havi ikki tíð!“ siga vit. Men satt at siga er tað ikki rætt. Øll hava vit tíð. Vit hava ta tíð, vit fáa. Tí skuldu vit kanska heldur sagt, at vit hava valt at nýta tíðina til okkurt annað, um vit ætla at siga, at vit ikki hava tíð.

Tíðin fer. Soleiðis siga vit. Tað minnir okkum á, at ein dag er tað liðugt, har eru ikki fleiri dagar eftir. Tá ið vit tosa um, hvussu vit nýta tíðina, snýr tað seg um raðfesting. Tað veldst eisini um, hvat er aðalmálið í lívi okkara. Hvat eg fegin vil hava nátt, tá ið eg onga tíð eigi eftir.

90. Sálmur í Gamla Testamenti viðger júst tey viðurskiftini. Her verður týðiliga gjørt greitt fyri okkum, at har er eitt einasta, sum veruliga hevur týdning, og tað eru viðurskiftini millum meg og tann æviga Gud.

„At telja várar dagar tú okkum læri, at vit mega vísdóm í hjartanum fáa.“ Vísdómurin í hjartanum er at síggja rætta samanhangin í viðurskiftum mínum við tann livandi Gud.

„Klokkan slær, tíðin fer,“ syngja vit. Hetta er ein einfaldur sangur við einum greiðum boðskapi: at eitt er, sum ikki broytist, um so tíðirnar skifta – tað er Guds náði. Tað er gott at

vita í einum heimi, har mangir ræðuleikar eru og menniskju verða rykt burtur í einum splittsekundi.

Her mitt í tíðini hava vit frá Gudi fingið tað, sum ber ígjøgnum allar tíðir og heilt inn í ævinleikan.

Tað er eydna okkara, at eitt er, sum ikki svitast, og tað er Guds náði.

NÁÐI TÍN, HON ER MÍTT SKJÓL.

## Tá tú í Guds húsi situr

Tá tú í Guds húsi situr,
hoyrir orð hans ljós og blíð,
sum hann gjøgnum fólk sítt flytur.
Og so er tað eitt hví:
Hví kann ikki eg sum hini
prísa Gudi, góðsku hans.
Prísa hansar einkarsyni,
sum leið deyðan fyri oss.

Jesus sjálvur við oss sigur:
Kom til mín for hvíld at fá.
Hann so bønlig' her teg biður
ei at fara sær burt frá.
Men tú orð hans ikki lýður,
letur heimin lokka teg,
og tað, hesin heimur býður,
leiðir teg burt frá Guds veg.

Lat ei heimin meir teg lokka.
Halt teg burt frá heimsins veg.
Og so fá til Jesus tokka,
sum leið deyðan fyri teg.
Og so skalt tú glaður verða,
altíð far og Gudi prís'.
Og Guds orð tú fram skalt bera,
øðrum veg til hansar' vís.

*25. januar 1970 AJ.*

# Ein løgin jarðarferð

Asbjørn Kvalbein helt eina andakt á Visjon Norge í sendingini „I Pottemakerens Hus", har hann segði nakað soleiðis:

Ein amerikumaður, Billy at navni, gjørdist sjúkur. Hann sá skjótt, hvønn veg tað bar, so hann fór at gera fyrireikingar til jarðarferð sína. Konan var deyð frammanundan, og nú bílegði hann sær 4 pláss undir liðini á konuni. Hann syrgdi eisini fyri børnum teirra.

Men tað var eitt, sum hann elskaði so ómetaligt, og tað var motorsúkklan hjá sær, ein Harley-Davidson. Hann fekk gjørt sær eina kistu, sum var glær, so tað sást gjøgnum veggirnar á henni, og motorsúkklan skuldi so jarðast saman við honum í hesi kistuni.

Tá ið vit hoyra slíkt, fara tankar okkara aftur í tíðina til gamla Egyptalands. Har vóru faraoarnir jarðaðir við hesti og vogni og øllum møguligum ognarlutum.

Men hvat sigur Bíblian um slíkt? „Nakin kom eg úr móðurlívi, og nakin fari eg hagar aftur." Job. 1,21.

Vit skulu ikki døma nakran, men bara hugsa um okkum sjálv. Hvar standa vit? Tann, sum hevur tikið ímóti Jesusi her í lívinum, hevur arvalut sín í himli um aldur og allar ævir, og har er dýrdin heilt ómetalig.

*Effie Campbell.*

# Eisini Kristus hevur liðið

*Tí at Kristus leið einaferð fyri syndarar,*
*ein rættvísur fyri órættvísar. 1.Pæt. 3,18–22.*

Kanska tú heldur, at tú ert illa fyri og mást líða nógv, meðan mong onnur eru væl fyri og eru sloppin undan líðingum. Og tú ert vorðin beiskur um hetta. Tað er møguligt, at tú ert illa fyri og mást líða nógv; men hvussu tað er vorðið við hinum, er óivað torført hjá tær at døma um. Hvør hevur sítt, stórt ella lítið.

Tú skalt ikki hugsa um hini í hesum føri. Lít burtur frá teimum og lít at hinum einasta eina, sum kann hjálpa tær í neyð tíni! Lít at Jesusi! Hevur tú liðið, jú, eisini Kristus hevur liðið. Hesum noktar tú ikki fyri. Og hann hevur liðið nógv meira enn tú, eg og øll hini tilsaman. Hugsa um, hvussu hann

bar líðing sína, og søk tær mátt frá honum at bera tína líðing á sama hátt!

Lít at Jesusi, sum undan hinum stóra degnum fyri gleðina skyld toldi ein kross, við tað at hann lítilsvirdi skemdina, og hann nú situr høgru megin hásæti Guds! Ja, hugsa um hann, sum syndarar fóru so illa við, fyri at tú ikki skuldi gerast móður og mótlítil í sál tíni.

Hugsa um Jesus! Bið til Jesus! Sum tann, ið sjálvur hevur liðið, kann hann hjálpa øðrum, tá ið tey verða freistað. Eisini tá ið tú ert mótfallin, hjálpir Jesus tær!

*t.* týddi.

# Lívsins træ

Bíblian byrjar við frásøgnini um lívsins træ (1. Mós. 2,9), og hon endar eisini við frásøgnini um lívsins træ (Opb. 22,2). Tað eru mangir træðrir, ið peika fram móti frelsuni.

Nóa ark er eitt stórt loyndarmál. Tá ið tú sært arkina uttanífrá, er hon ein risavaksin træbátur, sum á gátuføran hátt rekur um á lívsins vatni. Trøini, sum Nóa ark er bygd úr, verja lívið á sama hátt sum lívsins træ. Fjalt fyri heiminum rúmar hesin yvirvaksni báturin eitt loyndarmál um tað æviga lívið.

Jesus doyði á krossins træi, og har var hann okkum til bjarging og vann okkum ævigt lív, um vit takka og taka ímóti tí.

*Effie Campbell* umsetti.

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á føroyskum, donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk**

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 5. febr. | Tekstur: | 4. Mós. 21,4-9 og Jóh. 3,16-17; | bíbliuorð: | Jóh. 13,15 |
| 12. febr. | Tekstur: | 5. Mós. 26,1-11; | bíbliuorð: | 5. Mós. 26,11a |
| 19. febr. | Tekstur: | 4. Mós. 27,18+22-23 og Jós. 1,1-9; | bíbliuorð: | Jós. 1,5b |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74




*Nr. 4* *19. februar 2017* *77. árg.*

# Harrin er miskunnari tín

*Tí at um so fjøllini vikast og heyggjarnir ridla, skal tó kærleiki mín ikki frá tær víkja og friðarsáttmáli mín ikki gretta sigur Harrin, miskunnari tín. Jes. 54,10.*

Fyri at fjøllini kunnu vikast og heyggjarnir ridla skal ein jarðskjálvti til. Slíkt uppliva vit ikki her á landi, men t.d. í Íslandi kunnu fólk merkja slíkan skjálvta í undirgrundini.Tað byrjar sum ein buldran, ein skjálvti, undir fótunum, kanska sum tá ið eitt tok fer framvið. Men har er bara onki tok. Ein jarðskjálvti fær veggir at rivna og í ringasta føri fær hann hús at rapa og grót at bólta oman úr fjøllunum.

Men hóast alt hetta hendir, so sigur Gud: „Skal kærleiki mín ikki frá tær víkja og friðarsáttmáli mín ikki gretta." Hetta er veruliga eitt gott lyfti at halda fast um.

Ongin okkara sleppur at liva lívið uttan mótgongd. Vit missa okkara kæru, og sjúkur og brek koma við aldrinum. Munnu vit ikki vita um at siga at kenna okkum púra einsamøll í heiminum, hóast vit eru mitt í eini mannfjøld.

Tað hendir fyri okkum øll, at vit renna okkum inn í trupulleikar, sum at enda gerast okkum so stórir, at vit ikki duga at síggja nakran enda á teimum. Vit vita hvørki út ella inn, og bæði ráðaloysi og ótti vilja taka valdið á okkum. Hvat fer framtíðin at bera við sær? Men minst til: Gud er trúfastur, hóast vit kunnu hava eina kenslu av, at hann er blivin burtur fyri okkum. Vit hava eitt lyfti at halda okkum til, hvussu tær ytru umstøðurnar so annars eru. Hóast vit ikki júst í løtuni

síggja ella merkja tað, so er tað kortini satt, tá ið Gud sigur: „Kærleiki mín skal ikki frá tær víkja og friðarsáttmáli mín ikki frá tær gretta."

Gud hevur gjørt ein friðarsáttmála ígjøgnum Jesus. Hesin friðarsáttmálin fevnir um ein og hvønn okkara, sum trúgva á hann. Guds friðarsáttmáli ridlar ikki, tí Jesus fullgjørdi hann við blóði sínum á krossinum. Í Jesusi Kristi hevur Gud fevnt okkum við einum ævigum kærleika.

Vit koma ikki fyri dómin, men eru stigin yvirum frá deyðanum til lívið. Tað stendur fast!

Ongin jarðskjálvti kann broyta hesi Harrans orð: „Friðarsáttmáli mín grettir ikki."

Gud er miskunnsamur. Hann elskar teg. Kom til Jesus við øllum, bæði sorg og gleði. Miskunnsemi er at taka tann, sum hevur tað trupult inn í føvning sín og inn at hjarta sínum. Og onki betri stað finst enn Jesu favnur.

# Fullkomin gleði

*Hetta havi eg talað til tykkara, til tess at gleði mín kann vera í tykkum, og gleði tykkara kann verða fullkomin. Jóh. 15, 11–14*

Kann maður gerast fullkomiliga lukkuligur og glaður? Jú, hann kann, tí at soleiðis hevur Jesus sagt. Lív og stremban okkara eru miseydnað, gerast vit ikki lukkulig. Alt, vit kunnu verða í samfelagsligum viðurskiftum, hvussu høgt vit koma, alt, vit kunnu fáa av æru og navnframi, og alt, vit kunnu keypa okkum fyri pening, er tó alt ov lítið, um tað ikki kann gera okkum glað og hjartans lukkulig.

Hin gitni yrkjarin í Týsklandi, Goethe, segði, tá ið hann var vorðin gamal, at hann bara hevði verið lukkuligur nakrar dagar í langa lívi sínum. Hin gitni ævintýrhøvundurin, H. C. Andersen sigur:

*Hvat hjálpir, um heimur fyri fótum tær lá,*
*Hvat hjálpti tær, um tú fekst gullkrúnu á,*
*tá ið hjarta tó ikki í gleði kann slá!*

Heimurin megnar ikki at geva fullkomna gleði og lukku. Men Jesus megnar! Øll boðan hansara miðar ímóti at gera

okkum hjartans glað: „Hetta havi eg talað til tykkara, til tess at gleði mín kann vera í tykkum, og gleði tykkara kann verða fullkomin.“

Lýð so á Jesu orð og ger eftir teimum – tað ger okkum fullkomiliga lukkulig og glað.

*t.* týddi.

# Mítt allarbesta

Asbjørn Kvalbein helt eina andakt á Visjon Norge í sendingini „I Pottemakerens Hus“, har hann segði nakað soleiðis:

Ein bispur í metodistakirkjuni læt ongantíð høvi gleppa sær av hondum at siga eitt orð um Jesus, tá ið hann kom í prát við fólk. Ein dagin fór hann til hárskeran at klippa sær. Har var nógv fólk og nógv prát inni. Tá ið hárskerin fór undir at klippa bispi, segði bispur: „Nú, Harry, hvussu koma Jesus og tú út av tí, hvussu sampakka tit báðir?“

„Á, eg geri mítt allarbesta, og tað eri eg nøgdur við!“

Bispur segði ikki meira; men tá ið hárskerin var liðugur at klippa honum, reistist bispur og segði: „Harry, eg haldi, at tú sært so móður út. Set teg niður í ein stól og hvíl teg, meðan tú drekkur eina cola, so skal eg klippa næsta viðskiftafólkinum fyri teg!“

„Nei, tað fer ikki at bera til,“ svaraði Harry.

„Ja, men eg skal gera mítt allarbesta,“ svaraði bispur.

„Títt allarbesta røkkur ikki til, mínir kundar verða ikki nøgdir við tað.“

„Ja, men soleiðis er tað við Jesusi eisini. Okkara allarbesta røkkur ikki til, tí okkara rættvísi er sum eitt skitið plagg. Eingin er rættvísur, tað vil siga, ger tað rætta. (Róm. 3,10) Men tá ið vit trúgva á Jesus og bjóða honum inn í okkara hjarta, so verða vit frelst og rættvísgjørd fyri einki. „Hvør tann, sum trýr, verður rættvísgjørdur í honum.“ (Áps. 13,39) Tað er ein gáva, sum vit fáa frá honum, sjálv megna vit einki, alt er ein stór náði, sum vit mugu takka so hjartaliga fyri.“

*Effie Campbell.*

---

Gud vælsignar hjúnalagið; men hann vælsignar ikki hor!

*e.c.* ums.

# Sannleikin

Hoyrt í Lindini: Sannleikin er ikki nakað, ið vit hava uppfunnið, men nakað, ið vit uppdaga. Vit kunnu avnokta Guds sannleika, men sannleikin verður verandi. Tað fær avleiðingar, um tú gongur ímóti sannleikanum og skúgvar hann til viks. Tað er tað sama, sum skúgvar tú ferðsluljósini til viks og koyrir út fyri reyðum ljósi.

Jesus segði um seg sjálvan: „Eg eri Vegurin, Sannleikin og Lívið.“ (Jóh. 14,6) Har hevur tú alt, sum tú hevur brúk fyri. Hevur tú bjóðað Jesusi inn í hjartað, gongur tú á Vegnum, sum gongur heim til himmals. Jesus er Sannleikin – ikki bara ein av mongum – men tann endaligi, ultimativi, og hann er sjálvt Lívið við stóra L, tað einasta lívið, sum veruliga er vert at liva.

*Effie Campbell.*

---

Åge Åleskjær: Tað „tokið“, sum heldur seg á jarnbreytini, hevur „tveir skinnarar“: Jesus Kristus og hann krossfestan. Tí er tað av størsta týdningi at boða evangeliið (Mark. 16,20; Áps. 8,5–8; Gal. 3,1–5) Tá koma teknini aftaná. Tey fylgja eftir og staðfesta Orðið. Tey eru ikki í miðdeplinum ella í fremstu røð, sum okkurt tú ert sjúkliga hugtikin av.

*e. c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á føroyskum, donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk**

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | |
|---|---|---|---|
| 19. febr. | Tekstur: 4. Mós. 27,18+22-23 og Jós. 1,1-9; | bíbliuorð: Jós. 1,5b | |
| 26. febr. | Tekstur: Matt. 6,17-18 og 1. Sám.16,4-13; | bíbliuorð: 1. Sám 16,7c | |
| 5. mars | Tekstur: Matt. 7,24-27; | bíbliuorð: Matt. 7,24 | |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74